

www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 07 - 2012

# Vælútgjørdir at røkja Brugduleiðina

Síðani herviligu Macondo vanlukkuna í Meksikanska Flógvanum eru trygdar- og umhvørviskrøvini í altjóða oljuvinnuni munandi herd, og hetta sæst eisini aftur, nú borað verður á føroyska landgrunninum. Tað kann skiparin á hjálpar- og atgerðarskipinum (support/standby) Esvagt Connector, Jakob Høst Moustgaard, vátta. Teir eru nevniliga so væl útgjørdir sum hugsast kann skuldi eitthvørt óhapp hent á leiðini, har Cosl Pioneer borar fyri Statoil. Esvagt Connector hevur tí mest nútímans útgerðina til at taka sær av eitt nú einum oljuleka á staðnum. Eisini hava teir møguleika at hýsa fleiri hundrað fólkum, skuldi okkurt álvarsligt hent á boristaðnum. Og tað gekk sjón fyri søgn, tá oljan.fo vitjaði umborð á Esvagtskipinum, ið kom á Havnina í vikuni fyri at skifta manning og fáa gjørt umvælingar. Tað er eitt dótturfelag hjá Esvagt í Esbjerg og Thor í Hósvík, Esvagt Thor, sum hevur fingið sáttmálan við Statoil at standa fyri tí partinum av boriverkætlanini á landgrunninum, sum er at vera stuðuls- og atgerðarskip á feltinum. Hetta er ein uppgáva vit taka í allarstørsta álvara. Vit hava eitt sera vælútgjørt skip og eina professionella manning, sum hevur roynt eitt sindur av hvørjum á heimsins høvum, sigur ein sera fryntligur og prátingarsamur skipari. Hann er í serliga góðum hýri henda dagin vit vitja, tí hann er partur av manningarskiftinum. Men hann tykist eisini vera tann eldhugaði skiparin, sum tekur eina hond í alla staðni, har tað er tørvur á tí, á brúnni og á dekkinum, eisini hesa seinastu løtuna, áðrenn farið verður í land og víðari á flogvøllin og higani heim til Danmarkar. Jakob Moustgaard hevur siglt við Esvagt í 12 ár og hevur verið við hesum skipinum seinastu fýra árini. Honum dámar væl sjólívið og er sjálvandi serliga spentur, nú hann er partur av enn eini roynd at finna føroysku oljuna og gassið. Tveir føroyingar eru partur av manningini og heldur skiparin, at tað má vera hugaligt hjá teimum at kunna avmynstra heima hjá sær sjálvum. Teir skifta

manning eina ferð um mánaðin og er talan um manningarskift og taka proviant, so koma teir til Havnar. Um teir bara skulu eftir olju, so gongur leiðin inn í oljuhavnina í Runavík. Skipið er væl útgjørt til at kunna fyribyrgja oljudálking og annars veita neyðsynjartænastur, um okkurt skuldi verið á vási. Hetta ikki minst nú arbeitt verður á djúpum vatni og í havøki, har veðrið ikki altíð er til vildar. Teir hava 800 metrar av flótisperrum, oljuskimmara, eldsløkkingarútgerð og ein serstakan bát til at fáa útgerðina uppá pláss. Oljuskimmarin, sum er fjarstýrdur, er av tí nýggjasta slagnum við 15 bustum, sum verður settur í sjógvin og kann skovla oljuna upp gjøgnum slangu og umborð á skipið. Skipið hevur eisini nógva sleipiorku. Tað kann hava 300 fólk umborð, skuldi verið neyðugt at evakuera boripall. Umborð er eisini sjúkrastova við 20 koyggjuplássum. Tað er nú umleið ein mánaði síðani, at boripallurin kom til Føroya og fór at bora. Jakob Moustgaard fegnast um, at veðrið hevur verið so gott hesa tíðina, ikki minst tá hugsað verður um, at borað verður í tí annars harðbalna Atlantshavi. Uppgávan hjá Esvagt skipinum er rættiliga fjølbroytt. Fyrr vóru brúkt vaktarskip eisini, men hesa uppgávuna hevur nú hjálpar- og atgerðarskipið saman við nógvum øðrum uppgávum. Skipið er sum so bygt sum eitt multi purpose skip, ið skal kunna veita nógvar ymsar tænastur á feltinum. Skiparin sigur seg vera væl nøgdan við tænasturnar teir hava fingið á landi í Føroyum. Hetta er ikki fyrstu ferð, at Esvagt Connector arbeiðir í Atlantshavinum. Hesi seinastu tvey árini hava teir veitt tænastur í Grønlandi í sambandi við boringar, sum hava verið har. Tað hevði verið hugaligt, um nakað gott kom burtur úr boringunum bæði í Føroyum og Grønlandi, sum vit eisini hava veitt tænastur til, sigur Jakob Moustgaard at enda. Mynd Jacob Moustgaard, skipari á Esvagt Connector. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller Sí eisini myndarøð frá vitjan umborð á skipinum á oljan.fo leygardagin.